# Sølufólk

**Til søludeild okkara innan skrivstovulutir sóknast vit eftir einum sølufólki at byrja skjótast gjørligt**

**Starvsøki:**
Sum partur av søludeild okkara fevnir starvsøki títt fyrst og fremst um sølu av skrivstovulutum, bæði í handlinum og við telefonavgreiðslu. Í tøttum samstarvið við tænastudeild okkara fært tú ábyrgdina av at tryggja viðskiftafólki okkara bestu og varandi tænastuna.

**Tín vangamynd:**
Vit vænta, at tú hevur royndir innan sølu ella handil. Viðkomandi útbúgving er ein fyrimunur, tó at størstur dentur verður lagdur á, at tú dugir væl at tosa við fólk, ert skyldurøkin og fyrikomandi. Herumframt skalt tú vera teldukøn/ur á vanligum brúkarastøði.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt avbjóðandi starv, har tú fært eina vøru- og søluvenjing á høgum støði. Saman við meiri enn 40 starvsfeløgum vilt tú mynda eina gamla, men nútímans fyritøku í støðugum vøkstri. Á Farodane leggja vit størsta dentin á, at starvsfólkatrivnaður og umstøður annars eru í lagi. Lønin verður ásett í samráði við leiðsluna.

Skrivlig umsókn við viðmælum/prógvum skal verða okkum í hendi innan mánadagin 20. august 2001.

FARODANE 08-01

FARODANE

*Farodane er 51 ára gamalt handils- og tænastuvirki, sum í dag er millum landsins fremstu heildarveitarar til skrivstovuna. Virksemið fevnir um sølu og tænastu av framkomnum KT-loysnum, kopi-, fax- og AV-tólum, skrivstovuinnbúgvi og øðrum skrivstovubúnaði. Farodane hevur eisini skeiðtænastuna Kvasir, umframt hjáfeløgini VIT Sp/f og Vision Software.*

*FARODANE P/F*
*Brekkutún 4*
*Postboks 109*
*FO-110 Tórshavn*


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2114, P/F M. J. Saltsøla, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Magni Johannesen, Grønalíð 5, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Elisabeth Johannesen, Grønalíð 5, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Elisabeth Johannesen, Grønalíð 5, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Magni Johannesen, Grønalíð 5, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 15. august 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2315, Sp/f Bio, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 20.05.2001.
Nýtt hjánavn: Sp/f Topshop (Sp/f Bio)
Endamál: Endamál felagsins er at reka biografvinnu, keyp og sølu og aðra vinnu í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 14. august 2001

Kristin Balle

---


# CAFETERIA-MEDHJÆLPER
## TIL
## FÆRØERNES KOMMANDO

En stilling som overenskomstansat cafeteriamedhjælper med 30 timer pr. uge er ledig ved Færøernes Kommando, Mjørkadal og ønskes besat pr. 15. september 2001.

**ARBEJDSOMRÅDE:**
Planlægning, tilrettelæggelse, fremstilling, kontrol og salg af produktionen og øvrigt varesortiment.
Salg, service og kassebetjening.
Planlægning, tilrettelæggelse, gennemførelse og kontrol af indkøb ved lokale firmaer.
Lagerstyring.
Daglig rengøring af køkkenet.

**KVALIFIKATIONER:**
Erfaring fra lignende stilling ønskeligt.
Evne til at arbejde selvstændigt.
Gode samarbejdsevner samt ordenssans.

**AFLØNNING:**
I henhold til organisationsaftale for hushjælpere i statens tjeneste af 10. maj 1996 mellem Finansministeriet og Forbundet af Offentlige Ansatte.
Der er endvidere til stillingen knyttet et særligt Færø-tillæg på kr. 600,00 pr. måned.

**ANSØGNING:**
Skriftlig ansøgning bilagt dokumentation for uddannelse samt oplysning om tidligere og nuværende beskæftigelse indsendes til:

**Færøernes Kommando**
Postboks 3195
FO-110 Tórshavn

mærket »CAFETERIAMEDHJÆLPER« inden den 31. august 2001.

Nærmere oplysning om stillingen kan indhentes ved Færøernes Kommando, Mjørkadal, tlf.: 311480, Andrass Petersen lokal 3500.


www.sosialurin.fo

Lesið Sosialurin -tað loysir seg




# Tórshavnar Ítróttarráð

**Úrslit av drátti 6. august 2001**

Hesir seðlar hava vunnið:

| | | |
|---|---|---|
| Vinningur | nr. 1: | 4452 |
| Vinningur | nr. 2: | 1950 |
| Vinningur | nr. 3: | 13277 |
| Vinningur | nr. 4: | 2758 |
| Vinningur | nr. 5: | 3140 |
| Vinningur | nr. 6: | 16456 |
| Vinningur | nr. 7: | 21750 |
| Vinningur | nr. 8: | 8591 |
| Vinningur | nr. 9: | 8685 |
| Vinningur | nr. 10: | 5016 |

Ringið til Kristionnu, tlf. 319017, ella Birgir, tlf. 210298.

# Húsar/Syðradals Skúli

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv fyri skúlaárið 2001/2002.

Starvið er 15 tímar um vikuna.

Umsóknarfreistin er til leygardagin 18. august 2001.

**Syðradals skúlastýri**
v/ Elin Syderbø
796 Húsar



# Heðin Brú hundrað og heiðraður

**Hevði eitt hitt mætasta skald føroyinga nakrantíð, Heðin Brú, verið á lívi í dag, hevði hann fylt hundrað ár. Í sambandi við føðingardag hansara, verður skipað fyri einum tiltaki. Eisini er ein av hansara mest lisnu bókum endurútgivin**

BÓKMENTIR
*Heri á Rógvi*


*Mansterk vóru eftirkomararnir hjá Heðini Brú møttir upp.*

Tað var heldur lítið sum eyguni spílaðu seg út, tá vit varnaðust, hvør skuldi koma á tíðindafund henda dagin. Í sambandi við Listastevnuna verður skipað fyri tíðindafundi so at siga hvønn dag. Henda dagin var heldur einki undantak, og luttakari skuldi vera Heðin Brú.

Heðin Brú er fyri langari tíð síðani farin av hesi verð, men eftir standa hansara bókmentir, sum so at siga eru at finna í hvørjum einasta føroyska heimi. Veruligan navn hansara var Hans Jacob Jacobsen.

Tað er í sambandi við, at hann hevði fylt 100 ár í dag, at gjørt verður eitt sindur burturúr.

Føroya Skúlabókagrunnur hevur valt at endurútgeva skaldsøguna »Men lívið lær«. Bókin hevur verið útseld hjá forlagnum í longri, so útgevararnir vóna, at bókin eisini kann hugsast at vera áhugaverd hjá øðrum enn skúlanæmingum. Bergljót av Skarði hevur ritstjórnað nýggju útgávuna. Hendingarnar í bókini fara fram seinast í 18. øld og fyrst í 19. øld. Um hetta mundi fara stórar broytingar fram í Føroyum.

Greitt er, at Heðin Brú veðrur nógv umhildin. Í formælinum á nýútgávuni fær eisini tað skoðsmál, at hann hevur verið við til at skapt ein samleika fyri føroyskar bókmentir.

## Bók til næmingar

Føroya Skúlabókagrunnur hevur seinastu tíðina gjørt nýútgávur av føroyskum klassikarum. Frammanundan eru Heiðin Hind og Stjørnuskaldið undir varða, savn við tekstum og myndum eftir William Heinesen.

Tað er Bergljót av Skarði, sum hevur ritstjórnað nýggju útgávuna av skaldsøguni. Hon hevur m.a. skrivað um sjálvan rithøvundin, tekstasløg og orðafrágreiðingar. Eisini hevur hon samskipað søguligt tilfar um eitt nú bátsbandið.

Bókin er sambært formælinum ætlað bæði framhaldsdeildini og eisini miðnámsskúlunum. Tað er sjálvandi ymiskt, hvussu næmingar í 8. flokki og ein 3.S fara at viðgerða bókina, men Føroya Skúlabókagrunnur heldur, at bókin kann brúkast til øll endamál.

Sjálv er Bergljót studentaskúlalærari. Hon undirvísir í enskum og føroyskum, men hetta seinasta árið hevur hon havt farloyvi. Tað var í eisini í hesum sambandi, at hon átók sær at ritstjórnað hesa góðu nýútgávu. Hon hevur brúkt nakrar mánaðir at arbeiða við hesum.

Bergljót sigur, at hon hevur fleiri ferðir upplivað, at næmingum dáma »Men lívið lær«. Orsøkirnar til hetta eru kanska, at tað er ein kærleikssøga við í søguna ella kanska, at bókin vísir eina góða síðu av kvinnuni. Í øllum førum hevur næmingunum dámt væl at lisið bókina, og við hesari útgávuni verður bókin kanska latin meira upp fyri næmingunum.


*Bergljót av Skarði hevur ritstjórnað nýútgávuna av »Men lívið lær«. Á tíðindafundinum mikudagin las hon upp úr bókini.*

## Tiltak

Tað verður eisini skipað fyri einum tiltaki í kvøld, fríggjakvøldið. Tiltakið er ein minningarløta skaldinum til heiðurs. Føroyski mentanarheimurin hevur spílað so mikið út, at tey kunnu borðreiða við eini 10 ymiskum innsløgum hetta kvøldið.

Tað er í eisini í sambandi við Listastevnu Føroya, at skipað verður fyri hesum tiltakinum. Nógv ymisk fólk fara at luttaka við bæði upplestri, spæli og sangi. Gulla Øregaard hevur samskipað tiltakið vegna Listastevnu Føroya.

Á skránni verður eitt sindur av hvørjum. Fyri líkasum at fáa Listastevnuna upp í part, ber Carl Johan Jensen fram eina heilsu. Gunnar Hoydal fer somuleiðis eisini at bera fram eina heilsu vegna rithøvundafelagið.

At siga frá sjálvum skaldskapinum hava fyrireikararnir fingið Bergljót av Skarði, sum jú eisini hevur ritstjórnað nýútgávuna av »Men lívið lær«.

Sonur Heðin, Bárður Jákupsson, fer at siga frá um ættina hjá pápanum. Páll Danielsen og Egi Dam fara at lesa upp brævaskifti millum Heðin Brú og Christian Matras. Somuleiðis fer Páll Danielsen at lesa stuttsøguna »Ein hersøga«.

Bæði sjónleikur og tónleikur verður eisini á skránni. Tað verður leikfelagið Gríma, sum kemur at standa fyri sjónleikinum. Martin Joensen og Johannus á Rógvu Joensen og aðrir fara at spæla bæði nýggjar sangir og eisini spæla tónleik afturvið leikinum.

# Bubbi: Týr eru frálíkir

**Týr er eitt gott dømi um, hvussu lokalur tónleikur eisini kann rigga globalt. Hatta er vegurin fram, um føroyingar hugsa um altjóða gjøgnumbrot, heldur íslendski tónleikarin, Bubbi Morthens**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Sjálvur hevur hann ongantíð havt ætlanir um annað enn at syngja á íslendskum fyri íslendingum.

Meðan aðrir íslendskir tónleikarar hava lagt seg eftir altjóða marknaðinum, hevur Bubbi Morthens gjørt eina rúgvu av fløgum á íslendskum, og hann er millum bestu dámdu tónleikarar í okkara grannalandi.

Hann hevur tó sína hugsan um, hvør tónleikur kann fáa gjøgnumbrot á einum størri marknað enn tí føroyska og íslendska.

- Tað ræður um at halda fast við tín samleika. Tú skalt brúka lokala tónleikin soleiðis, at hann eisini riggar globalt. Týr eru eitt gott dømi um, hvussu hetta kann gerast í Føroyum. Her hava teir brúkt ein gamalt kvæði til ein nýggjan rocksang, og tað er frálíkt, segði Bubbi Morthens við útvarpssendingina, Av ymsum ættum, sunnukvøldið.

- Hatta er vegurin fram, um føroyingar hugsa um altjóða gjøgnumbrot. Tað ræður um at brúka tann lokala tónleikin, so hann eisini riggar á einum størri marknaði, sigur íslendski tónleikarin.

Hann heldur, at tað er júst samleikin og upprunin, sum hevur gjørt, at til dømis íslendska Bjørk er vorðin heimskend.


## Amilo fartelda

Intel Pentium III 800 MHz Geril • 128 MB RAM • 10 GB Harðdisk • 8 x DVD • Disklastøð • 14.1" TFT-XGA Skerm • Silicon Motion Lynx3DM 8 MB Grafikkort • 56K V.90 Modem • Infrareytt samband Fast IrDa 1.1 • Windows ME DK • MS Works 2000 • 1 ára garanti

Kr. 18.995,-




FÍGGING, DØMI:
Útgjald: 6.332
Rest yvir 12 mðr.:
1.169 um. mðn.
Rest yvir 18 mðr.:
810 um. mðn.

Í samstarvi við:
formula.fo
fæst all neyðug service

3arin ELECTRONIC

SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo